







## Íbúðin í kjallaranum







# Sermerkt raðhús við íbúð í Hornabø

Raðhúsini liggja í veðurgóða og barnavinarligum umhvørvinum í Hornabø í vesturbýnum og hava sera gott útsýni yvir Nólsoyarfjørð og havnarlagið. Stutt er til skúla, frítíðarskúla, barnagarðar, miðbýin og handlar.

Uttanífrá síggja húsini ikki øðrvísi úti enn flest onnur hús, men innan sæst beinanvegin, at hetta eru eini øðrvísi hús. Her býr ein, sum er kreativ og hevur sera góð evnir til at innrættað hús. Stílurin er litlíkur, einfaldur og modernaður retro.

Raðhúsini eru umvæld fyri 1 ½ ári síðani. Vegg- og loftsplátur eru skiftar út og gólvini eru pussað og málað. Allir veggirnir, uttan teir í stovuni og trappuuppgongini, eins og loft og gólv, eru málað hvít. Trappuuppgongin er tapetserað við grønum mynstrutum tapeti, meðan trappan og gelendarin eru málað svørt.

Raðhúsini eru í trimum hæddum. Í miðhæddini er durur, køkur og stova í einum. Nýggi køkurin er frá Ikea og er hvítur við reyðum handtøkum. Hvítvørurnar eru úr stál og eru kókipláturnar feldar niður í borðplátuna.

Á loftinum er ein gongd, baðirúm við baðikar og trý kømur. Eisini er eitt "walk in" skáp.

Í kjallara hæddini er ein íbúð, sum innrættað við duri, baðirúm við brúsu og eitt alrúm. Íbúðin gevur nógvar møguleikar - eitt nú at leiga út ella at hava gott pláss til gestir, sum skulu gista. Eisini er hon vælegnað til tannáringar, sum hava brúk fyri egnum plássi ella bara tað, at hava nokk av plássi í sínum egna húsi. Umframt íbúðina er eisini ein vaskikjallari/fýrrúm.

Aftanfyri húsini er ein góður urtagarður við trøum, runnum og blómur. Eisini er gott pláss at hava havamøblar standandi.

Tú fært meira at vita um húsini við at ringja til Skyn á tlf. 35 74 00.

**Fakta:**

| | |
|---|---|
| Adressa | Hornagøta 22, Tórshavn |
| Byggiár: | 1958 |
| Hæddir: | 3 |
| Stødd innan: | 132 m² |
| Grundøkið: | 152 m² |
| Prísuppskot: | Kr. 2.100.000,- |

skyn

Tlf. 357400 · Tórsgøta 16 · www.skyn.fo